TJÓÐSAVNIÐ / HAVSTOVAN

# Drunnhvíti
# *Hydrobates pelagicus*

## Fyribils frágreiðing fyri teljing í Nólsoy í 2020

Leivur Janus Hansen, Jóhannis Danielsen, Jón Aldará, Steffan Joensen, Diana Kongsbak og Eva Kjæld Hansen

**27-11-2020**



Í juli og august 2020 vóru drunnhvítar taldir í Skriðubakka, Nýggjurð og Bólstaðtanga í Nólsoy. Hetta var fjórða árið, ið drunnhvíti varð taldur. Umleið 100.000 $m^2$ vórðu taldir. Úrslitið gjørdist umleið 10.000 reiður.

# Endamálið
Endamálið við teljingini er, at gera eina álítandi meting av búfuglum í drunnhvítastovninum í Nólsoy. Somuleiðis skal ein álítandi meting gerast fyri gongdina hjá hesum drunnhvítastovninum.

# Mannagongd
Í 2011 var farið undir at kanna hvørjar mannagongdir kundu nýtast. Av tí at drunnhvíti er eitt sera trupult fuglaslag at telja, hevur sera lítið verið gjørt við at telja hann aðrastaðni. Tað er síðstu 10 árini at verulig gongd er komin á hetta arbeiðið, serstakliga í Stórabretland. Tí varð avgjørt at nýta tær mannagongdir sum hava verið gjørdar fyri Stórabretland. Úrslitið av hesum partinum er frágreiðingin Drunnhvíti *Hydrobates pelagicus*: Fyribils mannagongd fyri teljing (Hansen, Simonsen, Olsen, & Danielsen, 2013). Í 2013 varð mannagongdin tillagað.

Í stuttum kann sigast um mannagongdina, at látið hjá drunnhvíta verður spælt og drunnhvíti ið svarar, verður skrásettur.

Í einum øki verður ein partur av flatuni taldur og samlaða talið av reiðrum verða roknað frá hesum.

Tað er ikki allur drunnhvíti, ið svarar, tá lát verður spælt. Tí er neyðugt, at finna útav hvussu stórur partur svarar. Tað verður gjørt við at vitja eitt kalibreringsøki fleiri ferðir, inntil mett verður, at øll reiður í økinum eru skrásett. Út frá hesum kann roknast hvussu nógv svar eru í mun til reiður.

Drunnhvíti hevur tvey ymisk lát, men higartil hevur munur ikki verið gjørdur á teimum tveimum sløgunum av láti.

Tað ber ikki til við vissu at siga, at eitt svar undan einum steini ella í einari holu kemur frá einum drunnhvíta, ið liggur á eggi. Hóast vit nýta orðið reiður í frágreiðingini, so skal havast í huga, at vit vita ikki fyri vist, at eitt svar er frá einum fugli ið liggur á eggi. Talan kann vera um geldfugl. Í enskum mannagongdum verður hugtakið "Apparently Occupied Site" nýtt.

Fyri at meta um gongdina hjá drunnhvítinum verður eigur kalibreringsøkið á Dølum at vera talt á hvørjum ári.

## Útgreinað

### *Øki*
Samlaða økið, ið skal teljast yvir fleiri ár, er meginparturin av eystursíðuni av Nólsoy, sonevnda drunnhvítabølið í Urðini. Avgjørt var, at í 2020 skuldu Skriðubakki og Bólstaðtangi teljast.



**Mynd 1. Grønu økini eru tald, reyða økið er tað sum ætlað varð at telja í 2020, meðan gulu økini møguliga skulu teljast.**



**Mynd 2. Hvíturð og økið Suðuri á Dølum varð talt í 2012 og er um 1 km til longdar. Strikurnar eru álirnar, ið vórðu taldar.**




**MYND 3. BÓLSTAÐ OG URÐIN VÓRÐU TALD Í 2013. STRIKURNAR ERU ÁLIRNAR, IÐ VÓRÐU TALDAR.**

***Kalibreringsøkir***

Tað er ikki eins stórur partur av drunnhvítunum, ið svarar ymsar dagar. Ein dag kann tað vera 25% og ein annan 45%. Neyðugt er at taka hædd fyri hesum. Tað verður gjørt við, at sama økið verður talt fleiri dagar. Hetta økið kalla vit kalibreringsøkið og hetta varð triðja árið at vit taldu kalibreringsøkið Suðuri í Dølum.




**MYND 4. KALIBRERINGSØKIÐ VARÐ TALT FYRI HVØRJA VITJAN.**

***Teljing***
Ein teljari og ein skrásetari skulu til, fyri at gera eina teljing. Ein part av tíðini vóru tað tvey toymi – fýra fólk tilsamans.

Drunnhvítalátið ið bleiv spælt, var grundað á eina upptøku í Nólsoy í 1987 (Ferdinand & Jensen, 1991). Nøkur sekund av upptøkuni vórðu "loop"-aði til ein 10 sekundir ljóðstubba.

Vindur og temperaturur vórðu eisini skrásett. Mátitólið var eitt JDC Electronics Skywatch Meteos 1. Fyri hvørja ál vórðu vindur og temperaturur skrásett.

Álir at telja eftir vórðu lagdar í lendið við ymsum frástøðum, sum mett var tað hóskaði seg. Talið av svarum varð skrásett fyri hvørjar 10 m av álini. Kalibreringsøkið varð talt fyrst á degnum.



**MYND 5. SKRÁSETARI VIÐ SKRÁSETINGARSKJALI.**

# Úrslit

## Reiður Suðuri í Dølum

Sama kalibreringsøkið varð talt Suðuri í Dølum í 2012, 2013 og 2020. Í 2012 var økið talt 10 ferð og úrslitið gjørdist 55 reiður; í 2013 var økið talt 5 ferð og úrslitið gjørdist 36 reiður. Í 2020 var økið talt 7 ferð og fyribilsøkið var 99 reiður.

## Kalibrering

Kalibreringsøkið í Dølum er 60 m langt og flatan 3000 m$^2$. Her vórðu 4 álir á tilsamans 480 m$^2$ taldar. Eftir at hava talt økið 7 ferð varð niðurstøðan, at her vóru 99 reiður.

| | |
|---|---|
| Miðal aftursvar | 0,267 svar pr. reiður |
| Standard frávik | 0,167 |




**MYND 6. MIÐAL AFTURSVAR OG STANDARD FRÁVIK KALIBRERINGSØKIR.**

| | |
|---|---|
| Miðal tættleiki av reiðrum í kalibreringsøkinum | 0,206 reiður pr. m$^2$ |
| Standard frávik | 0,093 |




**MYND 7. TÆTTLEIKIN AV REIÐRUM (REIÐUR/M$^2$) OG STANDARD FRÁVÍK.**

## Skriðubakki og Bólstaðtangi

Flatan av Skriðubakka er 25.000 $m^2$. Her vórðu 4 álir taldar, og flatan av teimum er 1220 $m^2$. T.v.s., at um 5% av flatuni eru tald, og hini 95% verða roknað útfrá hesum. Somuleiðis við hinum økjunum.

Samanlagt vóru tað 149 drunnhvítar ið svaraðu.

| | Talt | | Tættleiki | | Roknað | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Site** | **Area** | **AOS** | **Uncalibrated** | **Calibrated** | **Area** | **AOS** |
| **Skriðubakki** | 2220 | 10 | 0.008 | 0.028 | 25,000 | 1833 |
| **Skriðubakki B** | 1420 | 53 | 0.034 | 0.127 | 12,678 | 1605 |
| **Nýggjurð B** | 780 | 23 | 0.029 | 0.110 | 5,995 | 658 |
| **Bólstaðtangi** | 1440 | 18 | 0.013 | 0.047 | 32,000 | 1498 |
| **Bólstaðtangi N** | 540 | 27 | 0.050 | 0.187 | 10,000 | 1873 |
| **Bólstaðtangi S** | 240 | 18 | 0.075 | 0.281 | 9,000 | 2529 |

Tilsamans 9.026 reiður

## Tøkk
Tey ið varða av høgunum í Nólsoy skulu hava takk fyri vælvild.

## Keldur

Ferdinand, L., & Jensen, E. (1991). *Fuglaljóð. Ljóðbond*. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Hansen, L. J., Simonsen, W., Olsen, B., & Danielsen, J. (2011). *Drunnhvíti Hydrobates pelagicus: Fyribils mannagongd fyri teljing*. Tórshavn.

## Dagbók

15 juli til 13 august vórðu drunnhvítar taldir í Nólsoy. Leivur Janus Hansen (LJH), Jóhannis Danielsen (JD), Jón Aldará (JA), Steffan Joensen (SJ), Eva Kjæld Hansen (EKH)  og Diana Krossá Kongsbak (DKK) luttóku.

### Mánadagur 17. Juni

LJH og SJ.

Fyrireiking.

Farið varð til Nólsoyar kl. 09:30, og innaftur kl. 16:50.

### Mánadagur 15. Juli

LJH, JA, DKK og SJ.

Uppseting av Referensuøki og teljing.

Farið varð til Nólsoyar kl. 09:30, og innaftur kl. 16:50.

### Týsdagur 21. Juli

LJH, SJ, DKK og EKH.

Farið varð til Nólsoyar kl. 12:30, og innaftur kl. 18:25.

Taldu Referensuøkið á Dølum.

Taldu Skriðubakka 180, 200, 220.

### Mikudagur 22. Juli

LJH, JD, JA, SJ og EKH.

Farið varð til Nólsoyar kl. 9:30, og innaftur kl. 18:25.

Taldu Referensuøkið á Dølum.

Taldu Skriðubakka 20, 80, 140, 160, 240.

### Hósdagur 23. Juli

LJH, JD, JA, SJ og EKH

Taldu á Dølum 240, 260, 280.

Taldu Referensuøkið á Dølum.

Taldu Skriðubakka 260, 280, 300, 320.

### Mánadagur 10. August

SJ, JA

Taldu Referensuøkið á Dølum.

### Mikudagur 12. August

LJH, SJ.

Taldu Referensuøkið á Dølum.

Nevið 20, 60, 100,

### Hósdagur 13. August
LJH, SJ og JA

Farið varð til Nólsoyar kl. 7:45, og innaftur kl. 18:25.

Taldu Referensuøkið á Dølum.

Nevið 140,

Bólstaðtangi 20, 70, 120, 170

Bólstaðtangi S 0, 20.